# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Føroysk listaframsýning í Íslandi

**Stórur áhugi er fyri føroyskari list í Íslandi. Umleið 200 fólk vóru koman saman, tá føroyska listaframsýningin í gallarí Hafnarborg í Íslandi lat upp**

*Orð og myndir:*
*Edmund S. Jacobsen*



*Eyðun av Reyni (v.m.) er ein av framsýnarunum*



*Stór føroysk listaframsýning í Hafnarborg í Íslandi*

Hósdagin 11. januar 2007 kl. 17.00 læt upp ein stór føroysk listaframsýning í Hafnarborg í Íslandi. Við á framsýningini eru verk eftir: Edward Fuglø, Astri Luihn, Sigrun Gunnarsdóttir, Torbjørn Olsen, Eyðun av Reyni og Ingálvur av Reyni, sála.

Hóast kavarok og illveður hendan dagin vóru eini 300 fólk komin saman til fernisering, so áhugin fyri framsýningini má sigast at vera stórur.

Pétrun Petursdóttir, savnsleiðari á Hafnarborg, bjóðaði vælkomin, og Helga Hjørvar, stjóri á Norðuratlantsbryggjuni, í Keypmannahavn, bar fram røðu og setti framsýningina.

Framsýningin er at síggja til 4. februar.

---

**Prógv**

Malan Mikkelsen, hevur tann 29. novembur 2006 fingið prógv, sum matvøruverkfrøðingur (cand.techn.al) á Danmark Tekniske Universitet (DTU).

**Dagurin**

**23. januar. Emerentius.** Navnið er komið skeivt fyri; tað skal vera Emerentiana, deyð umleið ár 300 (í gomlum álmanakkum Emerent). Hon var vinkona við Agnas (sum varð tikin av døgum umleið ár 300) og var steinað til deyða, tá ið hon fylgdi vinkonuni og harðliga hevði at teimum, sum píndu og drupu hana.

# Landslæknin fer við Skálabergi

**Landslæknin, Høgni Debes Joensen, fer nú í farloyvi í tríggjar mánaðir. Í hesum tíðarskeiði verður hann við flakatrolaranum, Skálabergi hjá JFK-Troli í Klaksvík. Danski læknin, Per Vagn-Hansen, fer at loysa av, meðan landslæknin verður í Barentshavinum**

**ÚT Á HAV**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Landslæknin fer nú til skips við Skálabergi, men hetta er ikki fyrstu ferð, hann fer í Barentshavið*



*Avloysari í landslæknaembætinum verður danski læknin, Per Vagn-Hansen, sum eisini er rithøvundur*

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Høgni Debes Joensen tekur farloyvi og fer til skips.

Vártúrarnar í 2003 og 2004 var hann umborð á flakatrolaranum, Sundabergi, og nú fer hann so at royna seg umborð á Skálabergi.

Høgni trívist væl at sjónum og er fallin væl til saman við manningini umborð.

Nú leiðin hjá landslæknanum gongur í Barentshavið, fer danski læknin, Per Vagn-Hansen, at virka sum vikarur fyri Høgna Debes Joensen.

Per Vagn-Hansen verður í starvinum hjá landslæknanum frá 24. januar og fram til endan av apríl mánaða.

## Avloysarin

Høgni Debes Joensen hevur sent út eitt tíðindaskriv um farloyvi og avloysaran.

– Um Per Vagn-Hansen er í stuttum at siga, at hann varð lækni í 1969 og tók embætislæknaprógv í 1978. Hann starvaðist í fleiri ár í danska Heilsust‡rinum sum lækni, eitt skifti sum yvirlækni. Per hevur drúgvar royndir sum embætislækni og var í slíkum starvi árini 1982-2003 í Storstrøms Amt, og síðani 2003 hevur hann verið stjóri á ráðgevingarfyritøkuni, Public Health Dialogue.

Lagt verður aftrat, at í Danmark er Per eitt nú kendur sum undirvísari hjá pedagogum, lesandi, læknum, kommunalum starvsfólki og øðrum.

– Mest kendur man hann annars vera sum rithøvundur, og kendastu bøkur hansara eru helst ”Sundhed, miljø og hygiejne i pædagogisk arbejde (572 bls)” og ”Håndbog for dagplejere og dagplejepædagoger (197 bls)”, ið komu ávíkavist í 2006 og 2005, sigur Høgni Debes Joensen í tíðindaskrivinum.